# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

Móttøka á Verkstaðnum Vón:

## Serstovnadeildin 10 ár á baki

**Í sambandi við at 10 ár eru liðin síðan Serstovnadeildin varð stovnað, varð bjóðað til móttøku á Verkstaðnum Vón á Argjum fríggjadagin 20. februar 2004. Serstovnadeildin bleiv 10 ár 15. februar**



*Maud W. Hansen (h.m.) leiðari fyri Verkstaðið Vón, handar her Bjarna Clementsen, leiðara á Serstovnadeildini, og Hans Paula Strøm, landsstýrismanni, ein nýggjan faldara, sum lýsir endamálið og virksemi hjá Verkstaðnum Vón*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Móttøkan byrjaði við at Mary í Garði, leiðari í Heimarøktini og Serforsorgini, sum Serstovnadeildin er ein partur av, bjóðaði øllum vælkomin.

Eisini hildu Hans Pauli Strøm landsstýrismaður og Malena Arnholdsdóttir, formaður í Javna, talur.

Leiðarin á Serstovnadeildini, Bjarni Clementsen, segði í sínari talu, at tey høvdu valt at gera eitt sindur burturúr hesum degnum. Fyrst og fremst fyri at gera vart við at Serstovnadeildin er til og ger eitt stórt arbeiði á einum øki, sum ikki so nógv geva sær far um.

"Á verkstøðum og verkhúsum okkara kring landið hava vit roynt at markera dagin, við at bjóða lagkøku, so brúkarin eisini skal merkja at vit hava føðingardag" segði hann.

Síðan kom hann inn á hvat Serstonvadeildin er:

Serstovnadeildin er ein eftirkomari av virkseminum, sum Statens Åndssvageforsorg byrjaði í Føroyum í 1971, fyrst undir leiðslu av Storstrøms Amt í Danmark, síðani undir leiðslu av Socialstyrelsen/Sosialministerienum í Keypmannahavn.

Seinni bleiv navnið Statens Åndssvageforsorg skift út við navnið Andveikraverndin, sum í 1988 bleiv ein landsstovnur undir Almannastovuni og Føroya Landsstýri.

Andveikraverndin bleiv avtikin í 1994 og virksemið být sundur millum deildir á Almannastovuni. Í 1998 bleiv Serstovnadeildin ein partur av Heimarøktini og Serforsorgini, tá virksemið hjá Almannastovuni bleiv býtt í tveir stovnar undir Almannaráðnum.

Í dag rekur Serstovnadeildin 25 stovnar (32 eindir): 6 verkstøð/verkhús við 125 plássum, 5 bústovnar (8 eindir) við 41 plássum, 10 sambýlir (14 húskir) við 74 plássum (tilsamans 115 búpláss) og fýra umlættingarheim við 14 plássum.

Í 1973 byrjaði sjálvt Verkstaðið Vón, sum varður verkstaður í leigaðum hølunum hjá Losjuni á Tinghúsvegnum í Havn, og flutti síðani í nýggj hølir her á Argjum í 1980. Tíverri brendi hesin verkstaðurin í grund í 1996, og vit fingu høvið at byggja ein nýggjan bygning á sama stað, sum hin bygningurin stóð.

At enda takkaði Bjarni Clementsen øllum sum hava starvast í skipanini tey farnu 10 árini, bæði teimum á stovnunum, sambýlunum, verkstøðunum, í fyrisitingini, stovnsleiðarum og øllum hinum, sum hava gjørt sítt til at so nógv er komið burturúr.

Framsýning var av lutum hjá Vón og Virkni. Eisini spældu Ælabogin og M-as Blues Band. Høvið var at síggja verkstaðin og heilsa upp á leiðsluna í Heimarøktini og Serforsorgini og onnur, sum starvast í skipanini.



*Mary í Garði leiðari á Heimarøktini og Serforsorgini, fekk eina plakat frá Verkstaðnum Vón*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Nógv fólk møttu til móttøkuna tá Serstovnadeildin fylti 10 ár*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Á móttøkuni vóru millum onnur, Carita Bjørklund,formaður í Føroya Pedagogfelag, núverandi og fyrrverandi formaður í Javna, Malena Arnholdsdóttir og Diana í Puntabyrgi.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



## UTTAN ÚR HEIMI

# Drepa og pína í navni Harrans



*Hesin maðurin var millum teirra, sum vórðu særd, tá Harrans hermenn lupu á eina flóttafólkalegu um vikuskiftið*

*Mynd: Reuters*

**Harrans mótstøðuherur sigur, at hann ætlar sær at taka valdið í Uganda og at stýra landinum eftir teimum tíggju boðunum. Seinastu átjan árini hevur herurin burturflutt og dripið fólk í túsundatali. Seinasta vikuskiftið fullu 192 flóttafólk fyri Harrans hermonnum**

UGANDA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Harrans hermenn í Uganda halda ikki hvílidagin heilagan. Seinasta sunnudag lupu teir á eina flóttafólkalegu 25 kilometrar norðan fyri høvuðsstaðin Kampala. Tá teir fóru haðani, høvdu teir beint fyri 192 sivilfólkum.

LRA, sum er styttingin fyri enska navnið hjá Harrans mótstøðuheri, hevur síðani 1986 stríðst fyri at koyra Yoweri Museveni, forseta frá. Politiska dagsskráin hjá herinum er ógreið, men málið er at taka valdið í Uganda og at stýra landinum eftir teimum tíggju boðunum.

LRA hevur sína høvuðsstøð í grannalandinum Sudan, og amerikanska fregnartænastan heldur, at herurin telur um 3.000 mans. Fyri einum ári síðani vildi stjórnin í Kampala vera við, at Harrans mótstøðuherur var niðurbardur, og at leiðslan í herinum var sinnað at tosa um frið. Men vantandi álit ímillum partarnar gjørdi, at ongar samráðingar komu í lag.

Ein talsmaður hjá ugandisku stjórnini segði tá, at Harrans mótstøðuherur var komin á fallandi fót, men sivilfólkið hevur sannað nakað annað. Síðani seinasta summar hava Harrans hermenn framt fleiri sera blóðug álop, og tær seinastu vikurnar eru álopini harðnað.

Sambært altjóða felagsskapum er tað ikki heilt rætt at tosa um hermenn, tá tosað verður um LRA, tí flestu hermenninir eru børn og ungdómar, sum herurin hevur burturflutt, og sum verða noydd at berjast fyri hann. Ugandisku myndugleikarnir siga, at í fjør vórðu meiri enn 5.000 børn burturflutt. Tey verða síðani nýtt sum hermenn ella seld sum skøkjur, siga myndugleikarnir.

### Ræðuleikar

Tað er næstan einki mark fyri, hvat Harrans hermenn kunnu finna uppá, tá teir leypa á sivilfólkið. Mál teirra er at ræða fólk, og tað verður gjørt á ein so ræðuligan hátt, at fólk í tíggjutúsundatali eru flýdd frá húsi og heimi undan teimum.

Fyri nøkrum døgum síðani tosaði BBC við tann 23 ára gamla David, sum hevði verið fangi hjá Harrans heri.

- Teir bundu meg, løgdu meg niður og søgdu, at eg mátti ikki geva ljóð frá mær. Síðani setti ein teirra seg á bringuna á mær, meðan ein annar helt beinum mínum. Ein triði tók eina øks. Fyrst høgdi hann vinstra arm av mær, síðani hin armin, og at enda tók hann ein knív og skar nøsina, oyruni og varrarnar av mær, greiddi David BBC-tíðindamonnunum frá. Revsingina fekk hann, tí Harrans hermenn vildu vera við, at hann var í herinum hjá stjórnini.

Mannarættindafelagsskapir og ST hava fleiri ferðir fordømt Harrans mótstøðuher. Felagsskapirnir hava skotið upp, at leiðararnir í herinum verða drignir fyri ein krígsbrotsmannadómstól, men hesum hevur Barnahjálparfelagsskapurin ávarað ímóti. Har stúra tey fyri, at eitt slíkt rættarmál fer at fáa avleiðingar fyri tey rændu børnini.

*(Kelda: NTB)*



# Nú vil hann vera forseti

**Arnold Schwarzenegger vil hava amerikonsku grundlógina broytta, so hann kann gerast forseti**

USA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Eftir amerikonsku grundlógini eru tað bara tey, sum eru fødd í USA, sum kunnu gerast forseti, men hetta vil guvernørurin í Kalifornia hava broytt. Arnold Schwarzenegger er føddur í Eysturríki og kann tí ikki stilla upp til eitt forsetaval.

Í einari røðu í Washington sunnudagin mælti hann amerikanarunum til at broyta grundlógina. Sjálvur helt hann, at fólk, sum hava búð meiri enn 20 ár í USA, eiga at fáa rætt til at stilla upp til forsetaval.

- Nógvir evropearar, sum eru fluttir til USA, gera eitt megnararbeiði her, segði Schwarzenegger, sum sjálvur fekk amerikanskan ríkisborgararætt í 1983. Og hann hevði eisini onkur dømi at vísa á.

- Hyggið bara eftir, hvat fólk sum Henry Kissinger og Madeleine Albright hava avrikað, segði guvernørurin og minti á, at tey bæði eru fødd í Evropa.

# Í Russlandi sleppa kvinnur framat

**Einki annað land hevur so nógvar kvinnur í leiðandi størvum sum Russland**

KVINNUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Ráðgevarafelagið Grant Thornton hevur hugt eftir, hvussu tað gongst kvinnum at sleppa fram at leiðandi størvum í 26 ymsum londum. Kanningin umfataði 6900 fyritøkur í Amerika, Evropa og Asia.

Úrslitið vísir, at Russland er nummar eitt, tá tað snýr seg um at loyva kvinnum framat. Har sita kvinnur í leiðslunum í 89 prosentum av landsins fyritøkum. Á næsta plássi eru Filipsoyggjarnar við 85 prosentum, og síðani kemur USA við 75 prosentum.

Ringast stendur til hjá teimum niðurlendsku og pakistansku kvinnunum. Har hava bara 27 prosent av fyritøkunum eina ella fleiri kvinnur í leiðsluni.

Verður hugt at øllum nevndar- og leiðarasessunum, er Russland framvegis á odda. 42 prosent av øllum nevndar- og stjórasessum har eru mannaðir við kvinnum. Her kom Japan á niðasta pláss. Har hava kvinnurnar bara 7 prosent av nevndar- og stjórasessunum.